

G.g. *Hetta heftið er ikki liðugt, men ein fyribilsútgáva!*

# Broyt fólkaskúlalógina!

Nemingabókin, síða 92-97

Førleikar:

- At lesa og endurgeva einfaldar hugtaksmyndlar. At knýta hugtaksmyndlar til kvantitativa og kvalitativa vitan.

Veljið 12 næmingar til teir 12 leiklutirnar í talvuni niðanfyri. Restin av flokkinum verður býtt í samgongu og andstøðu. Samgongan skal helst hava meiriluta. Evnið til eina stutta lógarbroyting viðvíkjandi fólkaskúlan.

Sendið síðani málið runt í politisku skipanini, har teir 12 næmingarnir spæla sínar leiklutir fyri restini av flokkinum. Nýtið opnuna á síðu 94-95 sum hjálp. Minnist til, at málið kann saktans koma til sama persón fleiri ferðir. Tá atkvøðugreiðslur eru, atkvøða næmingarnir, ið ikki hava spælt nakran leiklut.

Teknið á talvuna eina modell yvir hvussu leiðin hjá lógaruppskotinum var.

Best er um næmingarnir sjálvir stýra tilgongdini, men lærararin má vera klárur at lofta støðuni, um næmingarnir ivast.

| | | | |
|---|---|---|---|
| Løgmaður | Landsstýrisfólk í mentamálum | Embætisfólk í Landsstýrinum | Lógartænastan |
| Áhugafelagsskapur | Løgtingsformaður | Framsøgufólk í mentamálum hjá samgonguflokki | Framsøgufólk í mentamálum hjá andstøðuflokki |
| Formaður í Mentanarnevndini | Minniluti í Mentanarnevndini | Embætisfólk í Løgtinginum | Tíðindafólk |